# Trivnaðarætlan

| Flokkur:<br>10.b 2009/10 | Næmingatal:<br>17 |
|---|---|
| Flokslærari:<br>Jóhan Danielsen | |
| Toymi:<br>Jóhan Danielsen<br>Noomi Reinert<br>Maria R. Johannesen | Hinir lærararnir í flokkinum:<br>Jóhan Mortensen<br>Kirsten í Hjøllum |
| Røklaskipanin:<br>Flokkurin hevur ábyrgdina av at halda B-hemsina og verður tað býtt í millum næmingarnar .<br>Hvør einstakur næmingur hevur ábyrgd av at halda sína hyll, borð og sín kassa ruddiligan. Til jóla og nakrar dagar áðrenn seinasta skúladag verður stovan ruddað í felag. | |
| Borðskipan:<br>Næmingarir eru nú so vaksnir og skilagóðir, at tey sleppa at velja, hvar tey sita, treytað av, at tað er arbeiðsfriður. | |
| Ymisk tiltøk í flokkinum:<br>Oktober - foreldraviðtalur<br>November - starvsvenjing<br>Februar - útferð (ikki avgjørt enn, hvar vit fara)<br>Mars - verkætlan | |
| Serliga viðmerkingar um flokkin:<br>Í flokkinum ganga 17 næm., 9. gentur og 8 dreingir.<br>Flokkurin er hampuliga væl fyri fakliga, tó hevði eitt betri arbeiðslag givið eitt betri fakligt úrslit.<br>Innlatingarætlanin liggur úti á heimasíðu skúlans. | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Maria J. Reistrup | Flokkur:<br>10. b | Skúlaár:<br>2009 - 2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Føroyskt

Tímar:
4 pultstímar um vikuna

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Tekstlesing (fagrar bókmentir (yrkingar, stuttsøgur, skaldsøgur), fjølmiðlatekstir, myndir)
Skrivlig avrik
Mállæra
Málmenning (bæði í skrivligum og munnligum høpi)

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Greina tekstir m. a. við atli at forteljara, sjónarhorni, kjarna, tema, tíð, stað, persónum og skrivingarlagi
Skipa skrivligt avrik, so avrikið verður greitt bygt og málið verður fjølbroytt og neyvt
Greina fjølmiðlatekstir eitt nú við atliti at sendara, móttakara, miðli og framburðarhátti
Hava góða og nýtiliga vitan um mállæru og duga at greina ein setning rætt við atliti at setningsliðunum
Framhaldandi at menna málsliga framburðarháttin, so næmingurin megnar at orða seg fjølbroytt bæði skrivliga og munnliga

Arbeiðsháttur:
Næmingarnir skulu læra at nýta ymsar munnligar framløguhættir
Arbeitt verður við ymiskum skrivligum uppgávum, so næmingurin lærir at skriva ymisk tekstasløg (genrur)
Spurnarbløð í sambandi við tekstlesing
Duga at nýta tekstviðgerð í sambandi við innlating av skrivligum avrikum
Greina setningar í mállæru og benda
Orðabókavenjingar

Tilfar og amboð:
Les 3 og tilhoyrandi arbeiðsbók
2 skaldsøgur (verða valdar í samráð við næmingarnar)
Pløyen, Grindavísan
Árni Dahl, Bókmentasøga 1, 2 og 3.
Tilfar frá eitt nú heimasíðuni Snar
Stutt mállæra
Ymisk ljóstøk
Ymisk stílevni

Nær verður eftirmett og hvussu:
Eftirmett verður eftir hvørjari undirvísingargongd/evni. Eftirmetingin er fyrst og fremst munnlig
Spurnarbløð
Skrivligar jóla- og páskaroyndir eru partar av eftirmetingini

| Latin inn:<br>13-9-2009 | Undirskrift lærarans:<br>Maria J. Reistrup |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Johan Danielsen | Flokkur: 10. fl. | Skúlaár: 09-10 |
|---|---|---|
| Lærugrein: Støddfrøði, grundskeið | | |
| Tímar: 4 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br><br>Pensum til fráfaringarroynd fólkaskúlans | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Tá hetta er grundskeið, er kunleikastøði hjá næmingunum er ikki so høgt. Tí er málið at hækka støði hjá hvørjum einstøkum næmingi í hvørjum einstøkum lærugreinaøki, soleiðis at teir kunna fáa eitt so nøkulunda úrslit til fráfaringarroyndina. Fyri at røkka hesum hevur hvør næmingur saman við mær, sett sær eitt ítøkiligt mál. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Sum vanlig regla er galdandi, at næmingarnir skulu venjast við at rokning er hent og mangan neyðugt í tí dagliga lívinum, við hesum í huga, verður arbeitt víðari við teirri vitan næmingarnir hava ogna sær.Vanlig undirvísing, har eg undirvísi uppi á talvuni og næmingarnir rokna. Eftir tað gangi eg millum næmingarnar og hjálpi tí einstaka. Tey skulu læta smáðar uppgávur inn hvørja viku, hesar rætti eg og tosi so við hvønn einstakan næming um uppgávuna og rokning sum heild. Á henda hátt komi eg , at kenna førleikarnar hjá tí einstaka nógv betri og verði tí betir førur fyri at stimbra hvønn einstakan næming eftir teirra førleika.<br>Tey skulu til fráfaringarroynd og tí verður stórur dentur lagdur á  royndar- royndir. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Avrit úr bókum : Kursus for 7-9 Færdihedsregnig, Skygni 8 og 9<br>Avrit frá alnótini : matematikbogen.dk og gratisskole.dk<br>Fimis og greiðslurokningar | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Eftirmetingin er grundað á eygleiðing,  dagligt samskiftið og næmingasamtalur. Næmingasamtalurnar eru eftir tørvi. | | |
| Latin inn: 15. september | Undirskrift lærarans: Johan Danielsen | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| | | |
|---|---|---|
| Lærari:<br>KH | Flokkur:<br>10.ab | Skúlaár:<br>09/10 |

Lærugrein:
støddfrøði víðkað skeið

Tímar:
4

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:
Funktiónir, skipað talpør, beint lutfall og ritmyndir.
Paráplar,øvut lutfall.
Á øðrum stigi (líkningar og ólíkningar ).
Trigonometri.
Vøkstur.

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
- at tey læra hugtakið "funktión", um beint lutfall, um linjurættar og samanssettar ritmyndir.
- alt um paráplar: forskrift, toppunkt og nullpunkt,
- øvut lutfall og hýperpil
- líkningar á øðrum stigi. Rokna røturnar . Rokna og ritloysa ólíkningar.
-innlit og brúk av sinus og cosinus
- rokna rentu,rentufót

Arbeiðsháttur:
Vanlig flokksundirvísing. Felags frágreiðing og síðani arbeiða næm. sjálvstøðugt , meðan lærarin vegleiðir.
Dentur verður lagdur á at brúka "Gula Hondbók ".
Næmingarnir mugu eisini venjast við at greiða frá.
Aðruhvørja viku er innføring.

Tilfar og amboð:
Skygni, Støddfrøði 10
Vøkstur
Trigonometri.
Har afturat verður gomul uppgávusett í greiðslurokning nýtt, partvís sum frálærutilfar og partvís sum innføring.
Hondbók í Støddfrøði
Rokninmaskina.

Nær verður eftirmett og hvussu:
eftir hvørja innføring og roynd.

| | |
|---|---|
| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Jóhan Mortensen | Flokkur:<br>10 a og b | Skúlaár:<br>09/10 |
|---|---|---|
| Lærugrein:<br>Danskt | | |
| Tímar:<br>4 | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>At lesa og samskifta mest møguligt á donskum.<br>At kunna um danska málið og donsk viðurskifti.<br>At næmingarnir fáa hollan førleika í skrivligum donskum. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>At leggja soleiðis til rættis, at næmingarnir mennast mest møguligt í tí, sum er nevnt omanfyri. | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Bæði eg, sum lærari, og næmingarnir lesa upp í tímunum. Meðan ymsu søgurnar verða tiknar ígjøgnum, verður skift orð um mangt og hvat í hesum sambandi. Kannað verður javnan, um næmingarnir eru førir fyri at fortelja søgurnar aftur á donskum við teimum viðmerkingum, ið vit hava knýtt at teimum, meðan tær vórðu gjøgnumgingnar. Skrivlig spurnarbløð skulu eisini svarast í samband við søgurnar. Í hesum sambandi sleppa næmingarnir stundum at arbeiða saman, men stundum verður einstaklinga avrik kravt.<br>Í samband við tey bæði høvuðsverkini, ið kravd verða í 10. flokki, fáa næmingarnir spurnarbløð, ið skulu svarast skrivliga.<br>Av og á fáa næmingarnir mállærutilfar at arbeiða við. Danskir sangir verða eisini sungnir. Stílar verða latnir inn eftir eini skipan, ið er gjørd fyri flokkin. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Munligt: Litterære arbejdsmønstre 1<br>Min ven Thomas (sum er annað høvuðsverkið. Hvat hitt verður, er ikki endalig støða tikin til enn.)<br>Ymiskt impulsivt (sangir, tíðindastubbar.........)<br>Skrivligt: Stílar<br>Stav selv 9<br>Skriftligt for 8. og 9. | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br>Í samband við hoyring í tímunum og tær uppgávur, ið verða latnar inn, verður ein støðug eftirmeting gjørd av undrivísingini og tí einstaka næminginum. Tað skrivliga verður í høvuðsheitum eftirmett í samband við terminsroyndirnar. | | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari: Noomi Reinert | Flokkur: 10.b | Skúlaár: 2009/2010 |
| --- | --- | --- |
| Lærugrein: Enskt | | |
| Tímar: 4 | | |

**Lærugreinaøki hetta skúlaárið:**

Endamálið við undirvísingini í enskum er, at næmingarnir menna teirra kunnleika innan mál og mentan, og fáa førleika til at brúka enska málið sum samskiftismiðil á imiskum økjum. Harafturat verður dentur lagdur á at menna vitanina um mál og málmentan og fáa innlit í ta stóru rollu, eingilska málið hevur í alheimsgerðini.

**Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:**

Høvuðsvektin í undivísingini er løgd á ljóðfatan og munnligar samskiftis-kunnleikar næminganna, men arbeitt verður tó nógv við lesi- og skrivifølreikunum eisini.

Undirvísingin skal fevna um:
Forstáðilsi fyri teksti
Mennan av orðahópi og rætt brúk av hesum
Mennan av mállæruni
Skrivifølreikar í skrivligum avrikum

Málið sum samskiftismiðil:
Miðað verður móti at næmingurin dugir at:

- skilja innihaldið í valdum tekstum og harafturat at skilja millum tey ymisku tekstasløgini
- skilja innihaldið í valdum tekstum og duga at seta teir í perspektiv til heimspartar, lívssituatiónir, bakgrund osv.
- greiða frá egnari meining við góðari mállæru og breiðum orðahópi
- greiða frá teksti, at velja til og frá og at taka støðu til egna meining á enskum máli
- luttaka í samrøðum
- samskifta skrivliga
- síggja enska málið sum, - og brúka tað sum inernationalur samskiftismiðil

**Arbeiðsháttur:**

Undirvísingin gongur fyri seg á enskum máli

Næmingarnir hava eina lesibók, har tekstir eru í, ið eru passandi fyri teirra málbrúk og menning. Næmingarnir lesa tekstir í skúlanum og tosa um innihaldið í hesum. Dentur verður ikki, á sama hátt sum áður, lagdur á upplestur og umseting, men á innihaldið og førleikar næminganna at samskifta um hetta. Næmingar lesa ikki upp tað, teir hava havt fyri at lesa heima, men lesa í staðin ókenda nýggja tekstin í skúlanum.

Stórur dentur verður lagdur á at brúka tað enska málið, og verða ymisk evnir viðgjørd í flokkinum, ið hava persónligan áhuga hjá næmingunum, og ella evnir, teir hava royndir við og eina meining um.

Næmingarnir hava fingið úflýggjað skema, har teir síggja nær innlatingar skulu gerast. Her er enska lærugreinin eisini viðfest. Næmingarnir skulu lata 5 stílar inn afturat royndarstílunum.

Tímatalvan er soleiðis sett upp, at mikudag hevur flokkurin 2 samanhangandi tímar í enskum. Hetta verður brúkt til undirvísing í skrivligum avrikum og enskari mállæru, tá hesi krevja tíð til gevandi arbeiði.

| |
|---|
| Eftir heystferiuna verður grundbókin løgd til síðis, og flokkurin fer at arbeiða tematiskt við einum og hvørjum tema, tey sjálvi velja. Nevnast kann, at sum støðan er í løtuni, letur til at vit fara at arbeiða við: hooliganismu í Onglandi. Hetta er eitt evni, vit hava verið eitt sindur inni á í undanfarna ári, og letur tað til at flokkurin hevur tørv á at fara grundigari til verka í omanfyrinevnda tema. Undirritaða er nøgd við avgerðina, tá sera nógv og fjølbroytt tilfar er at taka av um júst hetta evnið. Harafturat er tað áhugavert, at flokkurin hevur ein platform av vitan at byggja uppá frá undanfarnu viðgerð av evninum Hooligans í Onglandi. |
| Tilfar og amboð:<br>The New Choice for tiende, grundbók/lesibók<br>Lær teg enskt, mállæra<br>Stifinderen, mállæra<br>The Osbournes, umsetingar<br>Alnótin - bæði til skaldskap og til mállæru<br>Filmur<br>Tónleikur, sangtekstir |
| Nær verður eftirmett og hvussu:<br><br>Næmingarnir lata stíl inn til rættingar<br>Tá arbeitt verður við mállæru, og næmingarnir hava fingið uppgávur fyri heima, verður hetta rættað saman í flokkinum<br>Samskift verður nógv á enskum málið, og er hervið møguleiki hjá læraranum at fylgja við, hvørt tann einstaki næmingurin heldur seg til ella ikki, og um næmingarnir menna málbrúkið nøktandi. |

| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |
|---|---|

| | |
|---|---|
| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>Jóhan Mortensen |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Jóhan Mortensen | Flokkur:<br>10 a og b | Skúlaár:<br>09/10 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Týskt

Tímar:
4

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

Munligt týskt: Lesing av kendum og ókendum teksti.
Umseting av kendum teksti.
Samrøða í samband við kenda og ókenda tekstin.
Hoyriroyndir á týskum.

Skrivligt týskt: Umseting til týskt
Týsk mállæra

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
At hvør einstakur næmingur kemur so langt fram á leið í tí omanfyri nevnda, sum tað nú einaferð ber til. At næmingarnir mennast í týskum og eru væl fyri í smb. við tær royndir, ið eru í 9. flokki.

Arbeiðsháttur:
Vanliga verða tveir tímar nýttir til munligt týskt og tveir til tað skrivliga. Í tí munliga verður heimasetningurin tikin ígjøgnum í skúlanum. Næmingarnir skulu so lesa uppá við hús og verða hoyrdir í upplestri, umseting og práti á týskum. Av og á sleppa næmingarnir at royna seg í ókendum teksti og í hoyriroyndum. Í tí skrivliga verður umsett úr føroyskum/donskum til týskt og mállæruuppgávur verða tiknar ígjøgnum.
Næmingarnir fáa bæði høvi til at arbeiða saman og við einstaklinga avriki at vísa, hvat teir duga. Skúlin er væl fyri á telduøkinum, og sjálvandi verða teldurnar eisini javnan brúktar í undirvísingini – bæði í munligum og skrivligum.

Tilfar og amboð:

Munligt: Eine Brücke
Ókendur tekstur og hoyriroyndir (tilfar er tøkt á skúlanum)
Týskir sangir

Skrivligt: Tysk opgavehæfte 2
NB!!! Sum nevnt omanfyri, verður teldan eisini brúkt í undirvísingini.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Tá eg nú javnan hoyri næmingarnar bæði í upplestri, umseting og samrøðu, má tað metast sum ein støðug eftirmeting av undirvísingini.
Í tí skrivliga verður eftirmett í samband við, at vit í felag rætta tær skrivligu uppgávurnar. Tá arbeitt verður við mállæru inni á telduni, kann næmingurin alla tíðina eftirmeta seg sjálvan. Eg gangi eisini runt og snoddi meg fram til støðuna.

| Latin inn: | Undirskrift lærarans:<br>Jóhan Mortensen |
|---|---|

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Ásbjørn Berthelsen | Flokkur:<br>10 | Skúlaár:<br>2009/2010 |
| --- | --- | --- |
| Lærugrein:<br>Evnafrøði | | |
| Tímar:<br>2 tímar um vikuna | | |
| Lærugreinaøki hetta skúlaárið:<br>- Bitlahugtakið,<br>- evaeginleikar,<br>- sýru og lút,<br>- jón og jónsambindingar,<br>- mýl,<br>- kolevnafrøði,<br>- evni í dagligari nýtslu,<br>- evnafrøðiligur ídnaður og<br>- umhvørvisdálking.<br>- Møguliga onnur sjálvvald evni. | | |
| Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:<br>Høvuðsmál: At geva næmingunum enn størri innlit í evnafrøðilig hugtøk, og hvussu hesi hava ávirkan á lív og samfelag okkara.<br><br>Mítt mál fyri flokkin hetta árið er:<br>- at evnini í bókunum (leiðbeinandi lesiætlanini) verða gjøllari viðgjørd, og farið verður meira í dýpdina við evnunum<br>- at næmingarnir arbeiða nógv sjálvstøðugt við verkligum royndum | | |
| Arbeiðsháttur:<br>Verkligar royndir undirbyggja og prógva tað ástøðiliga. Tí arbeiða vit bæði við bókligurm tilfari - og við verkligum royndum í royndarstovuni. | | |
| Tilfar og amboð:<br>Spørg Naturen - Tema: Olie, et dansk råstof<br>Kemisk produktion og forurening | | |
| Nær verður eftirmett og hvussu: | | |

| Latin inn: | Undirskrift lærarans: |
| --- | --- |
| | |

# Ársætlan fyri lærugreinina

| Lærari:<br>Hans Toftegaard og Jóhan Danielsen | Flokkur:<br>10. a og b | Skúlaár:<br>2009-2010 |
|---|---|---|

Lærugrein:
Ítróttarbreyt

Tímar:
6

Lærugreinaøki hetta skúlaárið:

Økið er ítróttur, rørsla og teori innan økið "Ítróttur og Lívsstílur".

Mál fyri hvørt einstaka lærugreinaøkið:
Endamálið við ítróttini er, at næmingar læra at síggja gleðina við at røra seg og at kappast undir ítróttarligum umstøðum.
Eisini er tað av alstórum týdningi at teir læra at síggja týdningin av at eta rætt, sova regluliga og annars liva sunt.
Miðað verður eftir at breiðka hugsjónina hjá næmingunum viðvíkjandi hvat ítróttur er. Teir koma at læra grundsløg, grundtrin, stigskipanir, reglar, annars verður ein teoretiskur partur ein náttúrligur partur av undirvísingini.

Arbeiðsháttur:
Eins og undanfarin ár verður koyrt eftir disciplinum, har trýggjar vikur verða settar av til hvørja. Her verður hugsa um millum annað badminton, fitness, flogbólt, fimleik, hánbólt, frælsan ítrótt, dans og annars alt sum umstøður loyva.
Hvør tími er bygdur upp eftir einari fastari skipan. Byrja verður við felags upphiting eftirfyljandi av einum upphitingarspæli. Síðani er dagsins disciplin, og til seinast eru 10 minuttir til útstrekkjan og eftirmeting.

Næmingarnir fáa millum 10-15 minuttir undir brúsuni.

Í ítróttini er likamið og sálin í hásæti. Reinføri, kostvanar, formur, happing bert fyri at nevna nøkur, verða viðgjørd.

Møguligir gongutúrar, súklutúrar og uttanduratímar vera eisini. Svomið verður so vítt møguliga tá møguleiki er fyri tí.

Tilfar og amboð:
Allir viðkomandi hentleikar og tilfar eftir tørvi.

Nær verður eftirmett og hvussu:
Næmingarnir verða eftirmettir eftir uppmøting, virkni, hegni og sosialum førleikum.

| | |
|---|---|
| Latin inn:<br>14.september 2009 | Undirskrift lærarans:<br>HansToftegaard og Jóhan Danielsen |